# Deildar-leiðari má frá



Forkvinnan, Vár í Gong, sigur, at heilsustøðan hjá lærarunum er so hættislig orsakað av sálargligum ágangi, at einasta loysnin er at senda leiðaran til hús

**Forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, sigur at støðan í Heilsuskúlanum í Suðuroy er so fastløst og so álvarslig, at leiðarin má koyrast frá**

ÚTBÚGVING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Bæði deildarleiðarin á Heilsuskúlanum í Suðuroy og fýra av sjúkrameldaðu lærarunum eru limir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, men forkvinnan í felagnum, Vár í Gong, sigur, at heilsustøðan hjá lærarunum er so háttislig orsakað av sálargligum ágangi, at einasta loysnin er at senda leiðaran til hús.

Vár í Gong sigur, at felagið hevur verið í einari truplari støðu, tí báðir partar í stríðnum eru limir í felagnum. Og felagið hevur roynt at hjálp báðum partum.

Men nú er støðan so álvarsom, at fremsta málið má vera at hjálpa teim fýra lærarunum, sum felagið hevur í skúlanum.

Felagið nú er farið í samstarv við hini fakfeløgini, sum hava limir á skúlanum, og í yvirlýsing vísa tey á, at Mentamálaráðið ikki tekur støðuna í nóg stórum álvara.

Vár í Gong sigur, at felagið umhugsar, at nokta limum sínum at taka upp arbeiði á skúlanum, men á fundi við Mentamálaráðið í seinastu viku, vóru tey biðin um at bíða við hesum, tí Mentamálaráðið arbeiddi við eini loysn.

Men enn er eingin loysn funnin, og tí fara fakfeløgini nú at taka støðu til, hvat næsta stigið skal vera.

- Hetta má bara ikki halda fram, sigur Vár í Gong avgjørd.

# Fakfeløg ónøgd við Mentamálaráðið

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Heilsuhjálparafelag Føroya, Almanna- og Heilsuröktarafelagið og Kost- og Føðslufelag Føroya hava sent út yvirlýsing, har tey ákæra Mentamálaráðið fyri ikki at taka ótolandi støðuna í Heilsuskúlanum í Suðuroy í álvara**

ÚTBÚGVING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Í yvirlýsingini siga umboðini fyri feløgini, Vár í Gong, Ása Olsen, Jóhanna Køtlum og Bente Kjær:

Nú støðan á Heilsuskúla Føroya er blivin ótolandi bæði fyri næmingar og lærarar, vilja vit á hendan hátt vísa okkara ónøgd við, at Mentamálaráðið ikki tekur støðuna í álvara.

Skúlin hevur alt 2007 havt stórar trupulleikar, og sjálvt um arbeiðspsykologur hevur verið inni í málinum , er ongin loysn at hóma.

At 7 lærarar av 11 eru sjúkrameldaðir orsaka av sálarligaarbeiðsumhvørvinum vísir, at støðan er farin út av kós, og er tað átaluvert, at ein kann koma í eina tílíka støðu í dag. Vit skulu minnast til hvat slag av útbúgvingum skúlin bjóðar.

Tey, ið eru eftir á skúlanum eru deildarleiðarin og tveir fólkaskúlalærarar, og er nú øll útbúgvingin í vanda.

Størsti trupulleikin er, at ein er við at ofra tvær útbúgvingar, ið eru alneyðugar fyri alt føroyska samfelagið heldur enn at taka neyðug stig til at loysa trupulleikan.

Tann størsti taparin í hesum óhugnaliga spæli eru teir næmingar, ið hava sett alt annað til síðis fyri at fara undir hesar útbúgvingar, men sum nú vísa seg at detta á gólvið, um ongin grípur inn.




**Sólarris**
DAYMAKER lampan eftirlíknar sólarrisinum. Tú kanst seta lampuna at tendra tá tú vilt. Ljósstyrkin økist, soleiðis at hon lýsir við fullari styrki eftir 30 minuttum. Hendan økingin av ljósstyrkini stimbrar tínum biologiska uri og ger at tú spakuliga vaknar.

Sum við rættiligum sólarrisi, vil kroppurin so líðandi fáa boð um, at nú er tíð at vakna. Um ynskist, kann alt enda við einum vekitóna.

**Sólsetur**
Hevur tú ringt við at sovna, kann lampan mótsett spakuliga fara frá sólarrisi til sólsetur, so at tú slappar av og sovnar betri.

ergo.fo




J.C. Svabosgøta 6 FO-100 Tórshavn Tlf 315 777 Fax 315 772 ergo@ergo.fo www.ergo.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við

